TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina

Stuðulsfólkaskipanin er ein partur av sosialu deild í kommununi, hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum:

Serdeildin tekur sær av børnum og ungum við varandi breki, menningartarni o.l. , meðan Familjudeildin tekur sær av børnum, sum hava aðrar trupulleikar.

Søkt verður eftir stuðulsfólkum til báðar deildirnar, 20- 40 tímar um vikuna, sum skjótast.

**Størvini eru:**
- eitt starv 30 tímar um vikuna í stuðulstiltakinum "Bridgehúsinum" at stuðla einum drongi í skúlaaldri við Down's syndromi
- eitt starv 40 tímar um vikuna í dagstovninum í Øksnagerði at stuðla einum 2 ára gomlum fjølbrekaðum drongi
- eitt starv er 20 tímar um vikuna í barnagarðinum á Velbastað at stuðla einum barni í samskifti og samanspæli.
- eitt farloyvisstarv 30 tímar um vikuna í dagstovninum Lítlaskógi at stuðla einum 3-ára gomlum drongi við Down's syndromi, har m.a. arbeitt verður við miðvísari málmenning (Karlstadt-modellið)

Eisini eru onnur størv á dagstovnum 20-30 tímar um vikuna við børnum sum:
- hava talu- ella samskiftistrupulleikar
- eru í kreppu
- hava SI-trupulleikar
- ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
- eru menningartarnað, hava Down's syndrom o.l.

**Vit kunnu bjóða**
eitt spennandi og mennandi starv, har tú bæði arbeiðir sjálvstøðugt og ert partur av einum bólki av starvsfeløgum. Eisini hevur tú fast samband við pedagogiskan ráðgeva.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur námsfrøðiliga útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á at tú:
- hevur royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið.
- hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi.
- ert búgvin, kanst arbeiða sjálvstøðugt og ert opin fyri menning í arbeiðinum.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið kann verða fulla- ella parttíð og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, ella møguliga annað avvarðandi yrkisfelag. Skipað verður fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Birgit Debess, leiðara á Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, deildarleiðara á sosialu deild, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 28. august 2002. Viðmerk á umsóknina "Stuðulfólkaskipanin".

SNARSKIVAN



Sosialurin -har tað hendir



EFFER
# KRANI
**14100 N-4S til sølu**
Árgang 1990
Røkkur hydr. 12,50 m
Hevur spæl
Kann keypast við
ella uttan radiostýring

SP/F NORÐ TRUKK
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315
110 Tórshavn
Tlf. 311536 / 215136 · Fax 310931






## Garaga til leigu
Dupult garaga í miðbýnum til leigu.

Kann brúkast til goymslurúm.

**Tlf. 312257**



## Til sølu
Ein Suzuki GS 500E, árg. 99.

P/f AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík

## Ortopædkirurgiskur skómagari & bandagistur
frá SAHVA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 27. aug. 2002 og á Landssjúkrahúsinum 28., 29. og 30. aug. 2002.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463 / 456191, týsdag og mikudag kl. 10.00 – 12.00.



zarepta
## ZAREPTA-legurnar 2002
**Lega fyri 18 ár og eldri verður í vikuskiftinum 16. – 18. august.**

**Kostnaður: kr. 400,-**

**Tekning á tlf. 332140**

**Bussur fer úr Leirvík kl. 17.20, av Skipanes-krossinum kl. 17.30 og úr Tórshavn kl. 17.30.**



## Kappsigling á Skálafirði
***Lions Club Eysturoy skipar fyri árligu kappsiglingini sunnudagin hin 18. august kl. 15.00***

**Luttøka tilmeldast:**
John Rasmussen, Strendur, tlf. 448641
Símun Rasmussen, Strendur, tlf. 447165

í seinasta lagi leygardagin 17. august kl. 12.00.

**Lions Club Eysturoy**



## Kundamóttakari
Søkt verður eftir kundamóttakara til avgreiðsluna hjá verkstaðnum. Arbeiðið fevnir eisini um tilrættalegging, telefonavgreiðslu og fakturering. Góð løn til rætta persónin.

**P/f Meinhardt Arge**
Tlf. 345400
att.: Heðin ella Finnbogi





TÓRSHAVNAR KOMMUNA



### Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

www.torshavn.fo

## Starvsfólk við byggitekniskum kunnleika til Snarskivuna

Tekniska økið í Snarskivuni leitar eftir eldhugaðum starvsfólki

**Tað er tær vit leita eftir, um tú**
- ert ágrýtin, kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd
- hevur áræði til at menna tekniska økið við mongu fjølbroyttu arbeiðsuppgávunum
- hevur hegni til at vegleiða og ráðgeva borgarum og vinnurekandi
- hevur førleika í føroyskum
- hevur royndir við at nýta teldu

**Uppgávurnar á tekniska økinum**
Umframt at virka sum bindilið millum Byggideildina, Teknisku deild og Snarskivuna, verður uppgávan at menna tekniska økið í Snarskivuni.

Skipað verður fyri upplæring soleiðis, at tú sum tíðin frálíður hevur eina breiða vitan um tekniska økið.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Ynskir tú at vita meiri**
Set teg í samband við Mourits Mouritsson, deildarleiðara, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa.

**Umsóknin**
Umsóknin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 2. september. 2002.



## Imponera skúlafelagan!

COMPAQ




**Compaq Presario 1505EA**
- P4 2000 MHZ 256MB RAM
- 20GB Harddisk
- kombi DVD og Cdbrennari
- 56K modem
- 10/100Mbit netkort
- Firewire Digital Video
- 15" XGA TFT-skerm
- ATI Radeon 7500 skermkort
- 32MB DDR SDRAM
- Windows XP, Word 2000, Works

Vakurt snið, bestu samanseting og megifyri ein góðan prís.

Hetta er ein framúrskarandi fartelda við góðum grafikki og millum annað tí nýggja standardinum USB 2.0 til tilseting av øðrum eindum.

COMPAQ Local Service Partner

COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449840

www.com-data.fo



## Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460








## FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Røgvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



## Lýsið har lýsingarnar síggjast

### Leys størv í Føroyum & uttanlands

Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.

Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

| | |
|---|---|
| 1 viku | kr. 1.000,- |
| 2 vikur | kr. 1.500,- |
| til freistin er úti | kr. 2.000,- |

Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo





Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820